# UMHVØRVISVIKAN

**TVØROYRI 30. APRÍL - 6. MAI 2018**

## Týsdagur 1. mai

### Plantingardagur í Trongisvági

**09:30** Viðrar, verða tey, ið vilja hjálpa, biðin um at møta kl. 9:30 í Ítróttardeplinum við Stórá, har ein kaffimunnur er at fáa. Til ber tó eisini at møta seinni. Takið endiliga børnini við

**12:00** Tvøroyrar Kommuna bjóðar ein lættan døgurðabita til luttakararnir.

## Ónsdagur 2. mai

### Dagstovnarnir í Trongisvági

**10:00** Fyrilestur um dálking, fyri børnunum á dagstovni í Tvøroyrar Kommunu. Elsa Berg úr Ringrás hugleiðir um plastdálking.

**13:30** Børnini á dagstovnunum planta runnar frammanfyri hølini, har útibarnagarð-urin heldur til.

**15:00** Foreldrakaffi á stovnunum. Foreldrini taka sjálvi krúss við - plastbikør verða ikki nýtt longur.

### Froðba

**18:00** Borgarafundur í Tarvafjósinum á Hamri, viðvíkjandi ætlanunum um at gagnnýta og varðveita gomul neyst. Fyritøkan "**Neysting**" skipar fyri. Røður verða hildnar og okkurt gott til góman verður at fáa.

## Tórsdagur 3. mai

### Varðin Pelagic

**19:00** Áhugaverdir fyrilestrar í fundarhølunum hjá Varðanum Pelagic:
**Eyð Eidesgaard**, góðskuleiðari á Varðanum Pelagic: Fiskaframleiðsla í býarumhvørvi.
**Agnes Mols Mortensen**: Um virksemið hjá Taravirkinum og atliti til náttúruna.
**Bogi Hansen**, havfrøðingur: Havumhvørvið og árinini av dálking.

### Gl. Kgl. Pub & Kafé

**21:00** Kokkatoymi úr Danmark vitjar Pubbin, við filmsliði og geva smakkroyndir av fiski, tilsett framleiðslu frá taravirkinum.

## Fríggjadagur 4. mai

### Fiskaplássið hjá Thomsen

**14:00** **Býráðslimir og umsiting** rudda fiska-plássið hjá Thomsen. Burturkastið verður skilt og koyrt burtur

### Naddoddaneystið

**18:00** Hugni fyri feløgini, ið hava tikið lut í uppruddingini í kommununi. Grill og okkurt afturvið verður at fáa. **Eyðun Nolsøe** syngur nøkur løg og **Jákup Veyhe** kemur at fortelja nakrar søgur úr **Mórugøtu**.

## Leygardagur 5. mai

### Seglloftið/alm. ruddingardagur

**10:00** Morgunmatur á Seglloftinum. Posar og einnýtisshandskar verða eisini at fáa og til ber hjá fólki at seta posar við ruski fram við vegnum. Ringjast kann síðan á tlf. **227161** ella **222438** so posarnir kunnu verða avheintaðir.

### Gongutúrur í miðbýnum

**13:00** Vit hittast við Tvøroyrar Bygda- og Sósavn og fara ruddingartúr. Øll fáa handskar og posa at savna rusk í og **Jákup Jensen** fer at greiða frá, um støðini vit vitja.
Túrurin endar í **Snaruni**, har vit fáa suppu frá **MorMor** og **Viberg Sørensen** fer at hug-leiða um Tvøroyri í gomlum døgum-

### Ruskplássið í grótbrotinum

**15:00** Umboð fyri **Dugna** eru á staðnum og taka ímóti lutum til endurnýtslu. Víst verður fram lutir, ið eru gjørdir í stand. Dugni bjóðar kaffi og okkurt afturvið.

### Seglloftið

**16:00** Spennandi umhvørvistiltak á Seglloftinum.
**Finnbogi Jensen**, úr Vestmanna, kemur at greiða frá um endurnýtslu av burturkasti.
**Otto Gram** fortelur um ruddingina av Trongis-vágsbotni. Filmur og myndir verða eisini at síggja. **Sissal E. Lervig**, marknaðarleiðari hjá IRF, greiðir frá umhvørvispolitikkinum hjá stovninum.
**Janus Wiberg Mortensen** syngur nøkur løg.

## Annað

### M/S Thorshavn

Ein av døgunum í umhvørvisvikuni, tá tað viðrar, luttekur søguliga skipið **M/s Thorshavn** í upp-ruddingini. Siglt verður kring fjørðin og rib-báturin verður nýttur at taka rusk upp, ið ringt er at sleppa til frá landi.

### Blákrossbúðin

Opið 13-17 allar gerandisdagar í umhvørvisvikuni við serliga góðum tilboðum.

